umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **Hvalbiar kommuna** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Bíarvegur 2, 850 Hvalba | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At gera grótkast millum kaiina á Hamranesi og bátahylin á Bíargarði | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 390a | 339776 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 17/00292 | 24. juni 2019 |

Suni Petersen, deildarleiðari

24/06-2019

Sjúrður J. Ferjá, umhvørvisviðgeri

# 1 Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá Hvalbiar kommunu er givin við heimild í §§28 og 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Góðkenningin fevnir um arbeiðið hjá Hvalbiar kommunu og møguligum undirveitarum teirra at gera útfylling til bátahyl millum kaiina á Hamranesi og verandi bátahyl í Bíargarði, so leingi byggiarbeiðið varir.

Góðkenningin er grundað á upplýsingar frá Hvalbiar kommunu og ráðgevum hennara. Tað er ábyrgdin hjá Hvalbiar kommunu, at upplýsingarnar, sum eru latnar Umhvørvisstovuni, eru rættar.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 2 Umsóknin

Hvalbiar kommuna sendi í mai 2017 umsókn um loyvi at fylla grót út á sjógv millum kaiina á Hamranesi og bátahylin á Bíargarði sambært §21 í lóg um verju av havumhvørvinum[1]. Talan er um at fylla eitt grótkast vestur úr kaiini á Hamranes umleið 215 metrar. Eisini verður fylt út eystur úr verandi bátahyli á Bíargarði einar 43 metrar. Stórt verjugróti verður útvegað úr vestara brimgarðinum á Hamranesi, úr grótbrotinum við Heygsvatn, og írestandi verjugrót verður skilt úr tunnilsgrótinum.

Búlendislýsingin varð gjørd av økinum í mai 2018. Úrslitið av kanningini vísti, at økið kann lýsast við tveimum búlendissløgum við plantum og djórum, sum øll eru rættiliga vanlig í Føroyum.

Umhvørvisstovan metti, at ætlaða útfyllingin út á sjógv ikki fór at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, og tók tí, sambært § 21, stk. 4 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum[1] avgerð um, at tað ikki er neyðugt við góðkenning sambært § 21, stk. 1 og tilhoyrandi árinsmeting sambært § 21, stk. 2 í lógini.

Hóast Umhvørvisstovan metir at ikki er neyðugt við árinsmeting, metir Umhvørvisstovan at útlát serstakliga av plasti í sambandi við arbeiðið at gera oman fyri nevndu verkætlan kann hava týðandi árin á umhvørvið.

Út frá hesum metir Umhvørvisstovan, at Hvalbiar kommuna skal hava umhvørvisgóðkenning til at gera útfyllingina, hóast virksemið, sum tað at gera útfylling á sjógv, ikki er nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina. Heimild fyri at krevja, at virksemi, sum ikki er nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, skal søkja um umhvørvisgóðkenning, tá ið mett verður, at serligur tøvur á tí, er í §28 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Umhvørvisstovan hevur tí tikið avgerð um, at Hvalbiar kommuna skal hava umhvørvisgóðkenning til virksemið at gera útfyllingina, sambært §28 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Hvalbiar kommuna søkti hin 31. mai 2019 um umhvørvisgóðkenning av arbeiðinum.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum

## 3 Lýsing av virkseminum

Hvalbiar kommuna ætlar at byggja ein bátahyl millum kaiina á Hamranesi og verandi bátahyl á Bíargarði.

Talan er um at nýta grót úr nýggja Hvalbiartunlinum at fylla út á sjógv. Ætlanin er at fylla umleið 40.000 $fm^3$ av gróti á sjógv. Stórt verjugrót verður útvegað úr vestara brimgarðinum á Hamranesi, úr grótbrotinum við Heygsvatn og írestandi verjugrót verður skilt úr tunnilsgrótinum. Fylt verður vestur úr havnini á Hamranesi umleið 215 metrar. Eisini verður fylt út eystur úr verandi bátahyli á Bíargarði einar 43 metrar. Frá innara kanti av grótkastinum verða 60 metrar inn til verandi sjóvarmála, sum verður órørdur. Tilsamans verða umleið 8.800 $m^2$ av botni lagdir undir grótfyllu. Sí mynd niðanfyri.



## 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Í sambandi við ger av nýggjum Hvalbiartunli, hevur Umhvørvisstovan fingið staðfest frá byggiharranum, sum er Landsverk, at Nonel® spreingiskipan verður brúkt til spreingiarbeiðið í Hvalbiartunlinum.

Plastleivdir frá spreingiskipanini í tunlinum fylgja við grótinum, og verða skolaðir av grótinum, tá grótið verður á sjógv.

Út frá verandi kunnleika metir Umhvørvisstovan, at millum 30 og 60 cm av plastleidningum er uppií hvørjum rúmmetri av føstum gróti. Um 40.000 $m^3$ í føstum gróti verða brúktir til útfyllingina, verða millum 12.000 og 24.000 metrar av spreingileidningi fluttir til útfyllingina. Umhvørvisstovan metir at einki ella sera lítið av plasti er uppi í stóra grótinum úr verandi brimgarði og grótinum úr grótbrotinum við Heygsvatn. Tí verður plastmongdin, sum verður flutt til útfyllingina nakað minni enn nevnt omanfyri.

Grótið verður flutt við lastbili og vippað á økið nær sjóvarmálan. Síðani verður tað ført út á sjógv við gravkúgv. Meira tilfarið verður handfarið, størri eru sannlíkindini til, at plastleivdir frá spreingiskipanini

losna frá grótinum. Tað sær út til, at plastleivdirnar flotna og síðani reka tær frá grótfyllingini alt eftir, hvussu vindur og streymur eru. Í Føroyum er eingin kanning gjørd av, um plastleivdir av hesum slagnum eisini liggja á botni, men norskar kanningar benda á, at tær flotna.

Umhvørvisstovan metir, at bert ein lítil partur av plastleivdunum, sum losna frá grótfyllingini, rekur upp á land, meðan stóri parturin av plastinum verður verandi í sjónum. Treytir verða settar til avbyrging av økinum fyri at afturhalda plastleivdum.

Umhvørvisstovan staðfestir, at verandi spreingiháttur í Hvalbiartunlinum er í samsvari við dagsins tøkni til slík arbeiði, men roynt verður at finna fram til aðra spreingitøkni til grót, sum skal brúkast til grót, sum skal fyllast út á sjónum.

Tí vera treytir settar til útlát av plasti frá verkætlanunum, sum fylla grót út á sjógv, og skulu brúka grót frá Hvalbiartunlinum ella tilsvarandi verkætlanum og grótbrotum annars.

## 5 Málsviðgerð

Í viðgerðini av umsóknini og til áseting av treytum er m. a. hetta tilfar nýtt:

- Umsóknum um umhvørvisgóðkenning frá 31. mai 2019
- Búlendislýsing av økinum millum Hamranes og Bíargarð, Biofar juni 2018
- Árinsmeting og góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini, US Vegleiðing nr. 16/2016
- Moss havn -Kartlegging av plastforurensning i forbindelse med utfylling i sjø, Rambøll Norge 2016
- Retningslinje for behandling av støy i arealplanlegging (T-1442/2012)

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at Hvalbiar kommuna leggur virksemið til rættis á ein hátt, so at umhvørvið verður ávirkað minst møguligt,
- at avmarka útlát av plasti so nógv sum gjørligt
- at avmarka ampar av óljóði og ristingum so nógv sum gjørligt,
- at avmarka útlát av dálkandi evnum, evju og dusti,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt,
- at mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum skulu vera tøkar og
- at útgerð til handfarin av dálkandi óhappum skal vera tøk.

Gongdin í viðgerðin av umhvørvisgóðkenningini er lýst í Kap 2. Umsóknin. Hvalbiar kommuna fekk uppskot til umhvørvisgóðkenning til viðmerkingar hin 14. juni 2019.

Hvalbiar kommuna hevði onga viðmerking til uppskotið.

# 6 Góðkenningartreytir

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Hendan umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.

6.1.2 Allar treytir í hesi góðkenning eru eisini galdandi fyri virksemið hjá undirveitarum hjá Hvalbiar kommunu, meðan teir arbeiða við oman fyri lýstu verkætlan. Hvalbiar kommuna hevur ábyrgdina av, at undirveitarar hjá felagnum halda treytirnar í hesi góðkenning.

6.1.3 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.4 Hvalbiar kommuna rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

6.1.5 Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa broyting.

6.1.6 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja at olja, kemikaliir ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunna dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.

6.1.7 Heldur virksemið uppat, skal alt tilfar og útgerð beinast burtur.

6.1.8 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini. Møgulig eftirlitsboð verða bara givin Hvalbiar kommunu uttan mun til, um tey fevna um viðurskifti hjá Hvalbiar kommunu ella undirveitara.

6.1.9 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir ella
- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkenningin varð givin.

6.1.10 Umhvørvisgóðkenningin er galdandi til arbeiðið at gera bátahylin er liðugt. Arbeiðið verður mett at vera liðugt, tá bátahylurin alment er tikin í nýtslu.

6.1.11 Um arbeiðið ikki er liðugt, tá 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað ella um minni dálkandi framleiðsluhættir ella betri reinsingarhættir eru komnir fram.

## 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Økini, sum henda góðkenning viðvíkir, skulu rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.2 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum, skulu gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.2.3 Høvuðsreglan er, at tað er bannað at koyra grót á sjógv, sum er dálkað við plasti ella øðrum dálkandi evnum.

6.2.4 Um Hvalbiar kommuna sleppir grót á sjógv, har væntast kann, at tað er dálkað við Nonel leidningsleivdum v. m. ella tilsvarandi plastleivdum, skal Hvalbiar kommuna tryggja, at møguligar Nonel-leidningsleivdir v. m., sum verða skolaðar leysar av grótinum til útfyllingina, verða hildnar aftur so nær útfyllingini sum gjørligt, t.d. við eini forðing.

6.2.5 Um forðing verður brúkt, skal Hvalbiar kommuna áðrenn arbeiðið byrjar, gera eina greiða og grundgivna ætlan fyri, hvørja og hvussu stóra forðing ætlanin er at brúka, hvussu hon tryggjar, at Nonel leidningsleivdir v. m. ikki reka burtur og hvussu plastleivdir innan fyri forðingina verða tiknar upp.

6.2.6 Hvalbiar kommuna skal regluliga savna Nonel leidningsleivdir v. m., sum verður hildnar aftur innan fyri forðing, og skráseta nøgdina av hesum í vekt.

6.2.7 Hvalbiar kommuna skal regluliga fylgja við, tó í minsta lagi eina ferð um vikuna, meðan arbeiðið fer fram og upp til ein mánað eftir at arbeiðið at gera útfyllingina er steðgað, um Nonel- leidningsleivdir v.m. reka upp á land á sandinum og fjøruni í Hvalba og Nesi, og savna og burturbeina hesar til móttakara av burturkasti, og skráseta nøgdina av hesum í vekt.

6.2.8 Um Hvalbiar kommuna brúkar aðra mannagongd enn forðing at tryggja, at møguligar Nonel-leidningsleivdir v.m., sum kunnu verða uppi í grótinum, verða hildnar aftur, skal Hvalbiar kommuna somuleiðis áðrenn arbeiðið byrjar, gera eina greiða og grundgivna ætlan fyri, hvussu hetta verður gjørt.

6.2.9 Hvalbiar kommuna skal savna Nonel leidningsleivdir v. m., sum liggja eftir omaná grótfyllingini, eftir hvønn arbeiðsdag.

6.2.10 Hvalbiar kommuna skal skjótast gjørligt kunna Umhvørvisstovuna um óvanlig viðurskifti, sum hava ella kunnu føra týðandi dálking við sær.

6.2.11 Ásetingarnar í pkt. 6.2.2 til 6.2.9 eru eisini galdandi fyri grót frá øðrum veitarum enn byggiharranum av Hvalbiartunlinum.

6.2.12 Hvalbiar kommuna sendir Umhvørvisstovuni tíðarætlan og mannagongdir viðvíkjandi punktunum 6.2.4 til 6.2.8 í so góðari tíð, at møguligar broytingar kunnu gerast, áðrenn arbeiðið byrjar.

6.2.13 Um óhapp ella annað førir við sær, at forðingin ikki virkar sum ætlað, skal einki grót fyllast út fyrr enn forðingin er komin í rættlag aftur.

6.2.14 Verður dálking staðfest av spreingileidningum í nærumhvørvinum, kann Umhvørvisstovan krevja, at Hvalbiar kommuna skipar fyri rudding.

## 6.3 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós

6.3.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum.

6.3.2 Ískoytið frá virkseminum, sum henda góðkenning viðvíkir og beinleiðis avleiddum virksemi til óljóðtyngdina við næsta grannamark, má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk:

| Bygningsslag | Krav um dagin (LpAeq12h 07-19) | Krav um kvøldið (LpAeq4h 19-23) ella sunnu-/halgidagar (LpAeq16h 07-23) | Óljóð um náttina (LpAeq,8h 23-07) |
|---|---|---|---|
| Bústaðir, frítíðarhús, sjúkrahús, røktarheim | 65 dB | 60 Db | 45 dB |
| Skúlar, barnagarðar | 60 dB meðan stovnarnir er í brúki | | |

Óljóðtyngdin: Ljóð, mált sum tað orkujavnaða, A-vigaða ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark.
LpAeq12h 07-19 merkir: miðal orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) í 12 tímar millum kl. 07-19.
Tilsvarindi fyri hinar styttingarnar.

6.3.3 Um Hvalbiar kommuna metir, at óljóðið fer at ávirka sama grannalag samanhangandi í meira enn 6 vikur, men styttri enn til og við 26 vikur, verða krøvini í 6.3.2 herd við 3 dB.

6.3.4 Um Hvalbiar kommuna metir, at óljóðið fer at ávirka sama grannalag samanhangandi í meira enn 26 vikur, verða krøvini í 6.3.2 herd við 5 dB.

6.3.5 Um tað eru at týðilig impulsljóð ella týðiligir eyðkendir reinir tónar er uppi í óljóðinum, kunnu krøvini í 6.3.2 verða herd við 5 dB. Impulsljóð kann stava frá boring, hamring, høgging og øðrum sláivirksemi. Reinir tónar kunnu koma frá útgerð sum pumpum og viftum.

## 6.4 Burturkast

6.4.1 Alt burturkast frá oman fyri nevnda virksemi skal handfarast og skiljast í samsvari við kunngerð[2] um burturkast og galdandi reglum hjá móttakara.

6.4.2 Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

6.4.3 Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum ella bingjum, og ikki vera til ampa ella elva til dálking.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19.10.1995 um burturkast.

6.4.4 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum hóskandi íløtum, t.d. UN-góðkendum íløtum.

6.4.5 Íløt við serliga dálkandi burturkasti skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki.

6.4.6 Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu verða sett og tryggjað soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

## 6.5 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

6.5.1 Hvalbiar kommuna skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd av gróti, sum er brúkt til verkætlanina í føstum tilfar, sum $m^3$
- Nøgd av innsavnaðum Nonel leidningsleivdum v. m. og øðrum tilfari frá spreingiútgerð, ella annað tilsvarandi tilfar, býtt upp í innanfyri forðing ella tilsvarandi, uppi á landi og á ymsum støðum á Hvalbiarfirði og økinum kring verkætlanina, í grammum.

6.5.2 Eftirlitsmyndugleikin skal til eina og hvørja tíð kunna síggja rakstrarskrásetingarnar ella biðja um avrit av rakstrarskrásetingunum, sum skulu goymast í 5 ár.

6.5.3 Hvalbiar kommuna skal í seinasta lagi 6 vikur eftir at longri steðgur er í arbeiðinum ella á hvørjum ári gera ein umhvørvisfrágreiðing við:

- uppgerð av rakstrarskrásetingunum og lyklatølum,
- frágreiðing um viðlíkahald og óhapp við umhvørvisligum árinum
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk

6.5.4 Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

# Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.